VINNUSÍÐURNAR

BLAÐIÐ við føroysku VINNU tíðindunum

# Vandi fyri at útgerð at basa oljudálking fer av landinum

**Fer hon av landinum, eru vit ógvuliga viðbrekin, skuldi oljudálking tikið seg upp**

OLJUVERND

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Vandi er nú fyri at tað mesta, vit hava av útgerð í landinum til at basa oljudálking, nú verður send av landinum.

Verður hon tað, eru vit ógvuliga viðbrekin, skuldi ein oljudálking tikið seg upp og tað fer at gera møguleikarnar at basa dálking, nógv verri.

Landsstýrið hevur havt ein sáttmála við OSR á Tvøroyri um tilbúgving framvið landi í sambandi við oljudálking.

Tann sáttmálin gekk út 31. oktober og Pauli Einarsson á Tvøroyri, stjóri í OSR, sigur, at enn er óvist um landsstýrið er sinnað at gera nýggjan sáttmála.




*Pauli Einarsson sigur, at sáttmálaskeiðið við landsstýrið var liðugt 31. august og fæst ikki nýggjur sáttmáli, fer oljuverndarútgerðin av landinum*

Eydnast tað ikki at gera nýggjan sáttmála, verður útgerðin send av landinum.

Ein partur av útgerðini hjá OSR er á vognum, so at hon er løtt at flyta stað úr stað. Ein slíkur vognur stendur í Havn og ein er í Runavík.

Hendan útgerðin umfatar m.a. oljuverjur, sum forðar fyri at dálking breiðir seg, og skimmarar at taka olju upp við.

Og fæst ongin avtala við landstýrið, fer eisini hon av landinum.

Pauli Einarsson heldur, at tað er rættiliga óheppið, at vit eru so illa fyri hvar oljuverndarútgerð viðvíkur, tí hann vísur á, at føroyingar hava bundið seg til at halda sáttmálar um havumhvørvið.

Við ongari útgerð verður tað trupult, leggur hann afturat.

Pauli Einarsson sigur, at er útgerðin fyrst farin av landinum, verður tað lutfalsliga dýrt at fáa hana aftur.

– Sálvsagt ber altíð til at útvega aðra útgerð, men tað er altíð dýrt at byrja av nýggjum, sigur Pauli Einarsson.

Hann heldur lítið um at tað kanska verður neyðugt at senda verndarútgerðina av landinum.

Tað eydnaðist ikki at fáa viðmerking frá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, Birni Kalsø, áðrenn blaðið fór til prenting-ar.

# Ógvuliga óheppið at útgerðin fer av landinum

**– Tað kann eisini fáa stórar avleiðingar fyri okkara fiskaútflutning, tí fiskakeyparar leggja størri og størri dent á umhvørvið, sigur sløkkiliðsleiðarin á Skálafirði**

OLJUVERND

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Fer oljuverndarútgerðin av landinum, er tað sera óheppið.

Tað heldur Sunleif Højgaard, sum er leiðari fyri Skálafjarðar Sløkkiliði.

Hann sigur, at útgerðin frá OSR, sum tey hava havt til taks á Skálafjørðinum, hevur roynst heilt framúr væl.

Runavík er oljuútgerðarhavn og har hava tey ein vogn við útgerð frá OSR á Tvøroyri. Og tað er meiri enn so, at tað hevur verið brúk fyri henni.

– Tilsamans hava vit tikið eini 25 tons av olju upp av sjónum inni á Skálafjørðinum, síðani vit fingu útgerðina, sigur Sunleif Højgaard.

Talan er um oljudálking, sum hevur tikið seg upp aftaná óhapp í sambandi við bunkring o.s.fr.

Tað er serliga útgerðin at taka olju upp av sjónum við, sum teir fara at sakna.

– Vit hava skimmarar frá OSR á Tvøroyri at taka olju upp við og tað er útgerð, sum riggar framúr væl og sum er sera vælegnað at taka olju upp við.

Hann vísur á, at tá ið teir hava tikið upp, er minni enn 1% sjógvur, so reint tekur hon upp.

– Fer hendan útgerðin av landinum, veit eg ikki, hvat so er til ráða at taka. Men tá veit eg heldur ikki, hvat endamálið er við prátinum um at taka olju upp av sjónum.



*Ì Runavík hava tey tikið eini 25 tons av olju upp av sjónum við útgerðini frá OSR á Tvøroyri og fer hon av landinum er tað sera óheppið, siga runavíkingar*

### Keyparar seta krøv

Sunleif Højgaard heldur eisini, at hetta kann fáa avleiðingar fyri okkara fiskaútflutning.

– Keyparar seta strangari og strangari krøv til umhvørvið og skuldu teir spurt, er tað ikki serliga heppið at vit vera noyddir at fortelja okkara teimum, at vit lítla og onga´útgerð hava til at taka olju upp av sjónum við.

Hann vísur á, at serliga í sambandi við aling kann tað vera óheppið ikki at hava slíka útgerð, tí fer olja á sjógv, er tað so skjótt, at hon kann dálka eitt alibrúk.

– Tað kann skjótt gerast rættiliga álvarsligt fyri okkara útflutning, so kanska er hetta í síðsta enda ikki krøv, sum vit sjálvi eru harri yvir, men krøv, sum okkara keyparar seta fyri okkum.

– Tí er tað avgjørt ein fyrimunur, at vit kunnu vísa á, at vit hava slíka útgerð í landinum, sum skjótt og væl kann basa eini oljudálking, sigur sløkkiliðsleiðarin á Skálafirði.

### Fer helst at henda aftur

Eisini Jákup Lamhauge, havnameistari í Runavík, heldur tað vera sera óheppið, at útgerðin fer av landinum.

Í øllum førum er tað alneyðugt at hava slíka útgerð í landinum, sigur hann.

Hann sigur, at tað hendir seg meiri enn so, at óhapp og mistøk elva til, at olja fer á sjógv og hann heldur at tað er alneyðugt at hava útgerð til at taka slíka dálking skjótt og væl uppaftur.

– Tað er hent fyrr og tað er lítið at ivast í, at tað fer at henda aftur, heldur havnameistarin í Runavík.